# eitt av mongum



*Belgiumenn høvdu nóg illa lagt ræðuleikarnar í Dutroux-málinum aftur um seg, tá tann 10 ára gamla Nathalie Mahy og tann 7 ára gamla Stacy Lemmens vórðu funnar myrdar í býnum Liége í fjør. Jarðarferðin gjørdist ikki bara ein sorgardagur hjá teimum avvarðandi, men hjá flestu belgiumonnum, sum mintust tað, sum var hent fá ár frammanundan.*

## Evropeiskt netverk

**Netverkið, sum varð stovnað í 2001, umfatar 19 felagsskapir í 15 evropeiskum londum. Felagsskapurin, sum fyri tað mesta arbeiðir í ES-høpi, hevur sum eitt av sínum málum at skipa eina ávaringartelefon, har horvin og kynsliga misnýtt børn í Evropa kunnu gera vart við seg. Ein annar málsetningur hjá netverkinum er at fáa tøknilig tiltøk, sum skulu forða fyri, at fólk kunnu keypa barnapornografiskt tilfar á internetinum við at rinda við gjaldskorti.**

Tað er sera ymiskt, hvussu hetta verður uppfatað í ymsum londum. Eitt eru tey, sum verða burturflutt. Í einum landi sum Belgia, sum hevur meiri enn 10 milliónir fólk, hava vit eitt ella kanska tvey slík mál um árið. So eru tað málini, har annað av foreldrunum tekur børnini við sær og flytir til sítt heimland við teimum. Vit hava eisini børn, sum stutt og greitt rýma frá foreldrunum ella av stovnum, og so hava vit tey børnini, sum koma higar einsamøll úr fátækum londum. Umleið 2.000 av hesum einsamøllu børnunum koma til Belgia um árið, og 500 teirra hvørva. Nøkur fara til okkurt annað land, tí hetta var ikki, sum tey høvdu væntað. Hesi børnini eru sera veik og kunnu vera løtt offur.

Dirk Depover vísir á, at á nýggjárinum verður Schengen-samstarvið víðkað, so lond sum Rumenia og Bulgaria koma afturat.

– Vit hava einki ímóti, at fólk ferðast, men vit vilja fegin hava ES-myndugleikarnar at gera sær greitt, hvat økt ferðing og øktir ferðamøguleikar kunnu hava við sær. Tí gera vit okkum ómak við at royna at ávirka ES, og eitt av málum okkara er ein felags telefon, sum horvin børn í Evropa kunnu brúka.

### Góð skipan

Kunningarleiðarin hjá Child Focus heldur, at Belgia er rættiliga frammarlaga, tá tað snýr seg um at taka sær av málum um horvin børn.

– Eg veit ikki, um vit eru dugnaligari enn onnur, men eg haldi, at vit í Belgia hava fingið eina góð skipan síðani tað, sum hendi í kjalarvørrinum á Dutroux-málinum. Eitt nú hava allar løgreglustøðir í landinum somu vegleiðing at ganga eftir, tá børn hvørva. Har stendur eisini, hvussu løgreglan skal samstarva við onnur lond, og eg veit, at myndugleikar í øðrum londum eru hugaðir at brúka okkara skipan, sigur Dirk Depover, kunningarleiðari hjá Child Focus, at enda.

*(Kelda: Aftenposten)*




*Einki av teimum horvnu børnunum hevur fingið so nógva umrøðu sum Madeleine McCann, og plakatir við mynd og navni hennara hanga um allan heimin. Hendan hongur á flogvøllinum í Lusaka í Zambia*

## Child Focus

**Felagsskapurin varð stovnaður tann 31. mars í 1998. Tað almenna heitið er The European Centre for Missing and Sexually Exploited Children, men vanliga verður stovnurin umrøddur við navninum Child Focus. Maðurin, sum tók stig til at stovna Child Focus, eitur Jean-Denis Lejeune. Dóttir hansara Julie var eitt av offrunum hjá Marc Dutroux. Child Focus hevur krepputelefon, sum er opin alt samdøgrið alt árið. Stovnurin leitar eftir børnum í Belgia og skipar fyri átøkum at forða fyri, at børn verða kynsliga misnýtt. Fyribyrgjandi arbeiði er ein partur av virkseminum, og stovnurin veitir offrum og teirra avvarðandi ráð og vegleiðing.**